

*Líkt er ikki til, at truplu tíðirnar hava fingið virkir og fyritøkur í Fuglafjarðar kommunu at halda aftur í at byggja og útbyggja*

Mynd: Vilmund Jacobsen

longur, men arbeiðir í samstarvi við vinnuna í økinum, sum er við í ætlanunum byggja góðskingarvirki. Stafettin liggur nú hjá vinnuni, sigur borgarstjórin.

### Kostnaðarmikið

Ætlanin er, at góðskingarvirkið til uppisjóvarfisk skal byggjast á økinum millum Havsbrún og Bergfrost.

Sigurd Simonsen dylur ikki fyri, at hann sera fegin hevði viljað sæð nýggja virki á havnarlagnum innan eini tvey ár, men hann ásannar, at nógvur peningur skal útvegast, áðrenn ein slík verkætlan kann reisast á føtur.

– Eitt framkomið góðskingarvirki fer helst at kosta

**»... eitt framkomið góðskingarvirki kostar einar 150 miljónir krónur**
SIGURD SIMONSEN

einar 150 miljónir krónur, væntar hann.

Jóhan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur sagt, at Fuglafjørður er best egnaður til eitt slíkt virki, tí Havsbrún frammanundan liggur í økinum og kann soleiðis keypa og brúka alt tað, sum fellir frá í matvøruframleiðsluni.

– Lá góðskingarvirkið í Fuglafirði, hevði uppisjóvarflotin eisini kunnað sloppið av við sína rávøru á einum staði, sigur landsstýrismaðurin, sum annars fegnast um virksemið á Faroe Pelagic í Kollafirði.

vilmund@sosialurin.fo

# Føroyar fáa 50.000 tons av norðhavssild

**SILD** Á fundi í London í hesi vikuni eru standalondini, sum umsita stovnin av norðhavssild, komin ásamt um heildarkvotu og býti

Vilmund Jacobsen

Strandarlondini í hesum samanhangi eru Føroyar, Ísland, ES, Noreg og Rusland.

Semjan um norðhavssildina fyri 2011 er, at mest loyvda veiðan verður sløk eina miljón tons – ella neyvt 988.000 tons tilsamans.

Føroyski parturin av heildarkvotuni er 5,16%, og verður føroyska kvotan av norðhavssild í 2011 soleiðis 50.981 tons.

Í Fiskimálaráðnum verður ásannað, at talan er um stóra minking av heildarkvotuni, sum í undanfarna ári var 1.483.000 tons.

Semjan um heildarkvotuna byggir á eina avtalu frá 2007 millum strandalondini um langtíðarumsiting av fiskiskapinum eftir norðhavssild.

– Hendan avtala hevur eitt nú ein veiðisetning og ásetir eitt fast býti av heildarkvotu millum londini.

### Stovnurin minkar

Fiskifrøðiliga verður mett, at stovnurin av norðhavssild, tó at hann er í

minking, kortini framvegis er væl fyri, men tilgongdin til stovnin hevur svikið seinastu árini.

– ICES vísir á, at hóast stovnurin verður væl umsitin, er metingin, at niðurgongdin fer at halda fram komandi ár, verður sagt úr Fiskimálaráðnum.

vilmund@sosialurin.fo

